

*Dystirnir millum B36 og EB/Streym hava mangan verið tættir og spennandi, við nærdystum og høgari fer. B36 liðskiparin, Klæmint Matras, verður tó ikki við sunnudagin vegna leikbann.*

*Mynd: savnsmynd*

# Sundalagsmenn aftur í Gundadali

**VODAFONEDEILDIN** Sunnudagin hittast B36 og EB/Streymur aftur í Gundadali. Liðini hittust í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini fyri einari góðari viku síðan. Tann dystin vann B36 2-1

Tróndur Arge

– Tað hevur sjálvandi eina sálarliga árvirkan at vit vunnu tann dystin, men hetta er ein nýggjur dystur, sigur Klæmint Matras, liðskipari hjá B36.

EB/Streymur byrjaði fyrru hálvfinaluna við at leggja seg á odda, men í seinna hálvleiki vendi B36 dystinum

– Vit mugu hyggja eftir gongdini í landskappingini, heldur enn at hyggja eftir hálvfinaluni. Har hava vit klára okkum væl í seinastuni, meðan B36 kanska ikki hevur koyrt so væl. Vit vóru væl nøgdir við fyrra hálvleik í Gundadali seinast, men serstakliga ónøgdir við seinna hálvleiki, so vit skulu byggja uppá tað, sum vit gjørdu í fyrra hálvleiki tá, sigur Pætur Dam Jacobsen.

B36 var í vikuskiftinum partur av einari spennandi og dramatiskari grannauppgerð, ið fekk eitt óheppi eftirspæl ímóti endanum av dystum. B36 leikararnir og viðhaldsfólkini vóru í øðini um eitt kolldømt mál.

– Vit í hópinum eru samdir um, at nú hugsa vit ikki meir um tað. Vit hava havt nógvar avgerðir ímóti okkum í ár. Vit fingu bóltin í málið og eg haldi tað var mál, men tað er farið og nú mugu vit hyggja frameftir, sigur Klæmint Matras, sum sjálvur varð útvístur stutt fyri dystar enda.

> **Sjálvandi hevur tað eina sálarliga árvirkan at vit vunnu dystin, men hetta er ein nýggjur dystur**

EB/Streymur vann mánakvøldið 3-0 á B68. Ein sigur, ið merkir at sundalagsmenn aftur eru við í oddastríðnum.

– Vit vistu áðrenn dystin ímóti B68, at við einum sigri var ikki so langt upp til toppin longur. Tað var týdningarmikið fyri okkum, at vit hildu málið reint ímóti B68. Tað hava vit ikki klára nóg væl í ár, sigur Pætur Dam Jacobsen.

Fyri EB/Streym er Alex dos Santos skaddur, mean tað er óvist við Dánial Davidsen og Rene Tórgarð. Fyri B36 er Klæmint Matras leikbannaður, meðan Símun Joensen og Ingi Højsted eru skaddir. Tað er eisini óvist um málmaðurin, Meinhard Joensen, verður klárur eftir skaða.

trondur@sosialurin.fo

# Símun á gamlar gøtur

**VODAFONEDEILDIN** Fyri HB leikaran, Símun Samuelsen, er dysturin leygardagin ímóti FC Suðuroy í Vági serstakur. Hann er uppvaksin í suðri og spældi sum ungur í táverandi VB

Tróndur Arge



*Landliðsleikarin, Símun Samuelsen, valdi føroyameistararnar HB framum FC Suðuroy.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Tað er sjálvandi stuttligt. Eg havi fingið mín fótbóltsuppvøkstur har og tá eg kom til Føroyar í vetur stóð valið ímillum FC Suðuroy og HB, sigur Símun Samuelsen.

Fyri leikarnar í FC Suðuroy er dysturin hinvegin ikki so serstakur.

– Hetta er ein dystur sum allir aðrir, men vit vita væl at HB er eitt gott lið, ið liggur í oddinum, sigur Palli Augustinussen, liðskipari hjá FCS.

HB misti um vikuskiftið oddasessin til ÍF, men tað tykist ikki hava tikið mótið føroyameistaranum.

– Lagið í hópinum er gott og vit eru á einum deildum fyrsta plássi, bara við verri málúrtøku. Vit tapa okkara fyrsta dyst í áttinda umfari í Fuglafirði, sum er eitt torført stað at spæla. Vit vildu eisini gjarna vinna á B36, men tað er ongin skandala at tann dysturin endaði við javnleiki, sigur Símun Samuelsen.

Í Suðuroy eru tey klár at taka ímóti Símuni Samuelsen.

– Hann hevur verið her fyrr sum GÍ leikari, so tað er ikki nakað nýtt fyri hvørki okkum ella hann. Símun kemur sjálvandi at hoyra fyri at hann nú spælir í HB, men hann er væl dámdur her suðri, sigur Palli Augustinusen.

Tá liðini hittust í fyrsta umfari, endaði dysturin eitt sindur óvænta við 4-4 javnleiki.

Teir góðu okkum ein kvøkk tá, men hesa ferð eru vit klárir, sigur Símun Samuelsen, ið hevur spælt allar dystirnar fyri HB í ár.

Í Suðuroy er málið fyrst og fremst at verja tað eina stigið.

– Tað hevur gingið illa hjá okkum í seinastuni, so vit mugu binda fyri í verjuni og so fáa vit at síggja hvussu langt tað røkkur, sigur Palli Augustinussen at enda.

trondur@sosialurin.fo

## Vodafonedeildin 10. umfar

| Dagf.: | Dystur: | Dómari: |
|---|---|---|
| 28.05 | ÍF - NSÍ | Eiler Rasmusen |
| 29.05 | FC Suðuroy - HB | Lars Müller |
| | AB - Víkingur | Rúni Gaardbo |
| 30.05 | B71 - B68 | Ransin Djúrhuus |
| | B36 - EB/Streymur | Páll Augustinisen |

## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 9 | 5 | 3 | 1 | 14 | 7 | +7 | 18 |
| 2 | HB | 9 | 5 | 3 | 1 | 17 | 13 | +4 | 18 |
| 3 | NSÍ | 9 | 5 | 1 | 3 | 18 | 9 | +9 | 16 |
| 4 | Víkingur | 9 | 4 | 3 | 2 | 18 | 15 | +3 | 15 |
| 5 | EB/Streymur | 9 | 4 | 2 | 3 | 15 | 11 | +4 | 14 |
| 6 | B36 | 9 | 3 | 4 | 2 | 16 | 15 | +1 | 13 |
| 7 | B68 | 9 | 3 | 1 | 5 | 17 | 20 | -3 | 10 |
| 8 | FC Suðuroy | 9 | 1 | 3 | 5 | 11 | 18 | -7 | 6 |
| 9 | AB | 9 | 1 | 3 | 5 | 12 | 20 | -8 | 6 |
| 10 | B71 | 9 | 1 | 3 | 5 | 9 | 19 | -10 | 6 |